TB-EB/Streymur 1-1 (0-1):

Hvørgin slapp leysur

Liðini áttu ein hálvleik í part á Sevmýru sunnudagin, so javnleikurin var helst eitt rættvíst úrslit, sum báðir partar eisini kunnu liva við

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Sorin Anghel royndi eins og vant at stríðast í álopspartinum, men sunnudagin varð hann væl ansaður. Á myndini eru tað teir báðir, Vladimir og Nebosja, sum hava gott tak á
Mynd: Áki Bertholdsen

Vit skrivaðu í leygardagsblað okkara, at fyri bæði EB/Streym og TB var tað av altavgerandi týdningi, at dysturin sunnudagin ikki varð taptur. Javnleikur varð úrslitið, og í so máta kunnu báðir partar helst vera so hampuliga nøgdir um úrtøkuna, tó at samansetta liðið við Streymin helst iðrar seg um, at tvørámenn fingu javnað somikið seint í dystinum.

Vindurin stýrdi

Tað var nakað væl av vindi eftir vøllinum á Tvøroyri, og hetta ávirkaði í stóan mun spælið.

Fyrra hálvleik vóru tað fyri tað mesta gestirnir, sum trýstu, men í mun til fleiri av undanfarnu dystunum, so tykjast tvørámenn nú at hava fingið tamarhald á verjupartinum, og tí eydnaðist tað sjáldan gestunum at spæla seg fram til teir heilt stóru møguleikarnar. Ta einu ferðina var tó um reppið, at Marni Djurhuus, sum spældi á miðvøllinum fyri skadda Jákup Martin Joensen, stútaði bóltin í netið, og eina aðra ferð fekk verjuleikari ruddað í evstu løtu, men samanlagt bendi alt á ein málleysan hálvleik.

Beint fyri steðgin eydnaðist tó EB/Streymi at fáa hol á. Ingi Hansen, sum nú aftur er at síggja á liðnum hjá EB/Streymi eftir útlegd á Skálafjørðinum royndi at bróta ígjøgnum. Tað eydnaðist tó verjuni at tackla bóltin av honum, men leðurkúlan støkk út til Hans Paula Samuelsen, sum ikki ivaðist, men langaði bóltin í kassan av brotsteigarmarkinum.

Vakurt mál

Í seinna hálvleiki var støðan júst hin øvugta. TB hevði nú vindin undan, og tá gestirnir samstundis royndu at verja leiðsluna, fremja tær heilt nógvu bjargingarnar. Verjan við fyrst og fremst Knút Vesturtún og Andrzej Pacek stóð seg allan hálvleikin sera væl, og tó at TB trýsti og trýsti, so var talan sjáldan um teir heilt stóru møguleikarnar.

Eins og tað hevði vist seg hjá gestunum fyri steðgin, so fekk TB tó løn fyri stríðið, tá smáir tíggju minuttir vóru eftir at spæla. Ein langur bóltur var sendur innfyri, og eftir at bólturin fyrst var stútaður tvørt fyri í brotsteiginum smekkaði Vladimir Matijivic til, so bólturin spílaði meskarnar uttan møguleika hjá málverjanum.

Sum skilst á þortunum báðum, so var talan um eitt hampuliga rættvíst, tó at báðir partar iðra seg um, at teir ikki megnaðu at standa ímóti trýstinum eina lítla løtu afturat.

Hinvegin, so var tað týdningarmesta sum nevnt, at dysturin ikki var taptur, tí hetta vildi viðført, at frástøðan upp til næstu áttanda skulu spæla ímóti ávíkavist NSÍ og B36, men eftir hetta verður talan hjá TB um dyst, sum kann fáa sera stóran týdning fyri botnstríðið. Tá kemur Skála nevnliga á vitjan á Tvøroyri, og kastar tann dysturin trý stig av sær, er lítið at ivast í, at tvørámenn kunnu draga andan heldur lættari í summarfrítíðini.

Dysturin í tølum

TB-EB/Streymur 1-1 (0-1)
0-1: Hans Pauli Samuelsen, 45
1-1: Vladimir Matijivic, 82
Dómari: Lassin Isaksen

TB: Lars Müller - Andras Nolsøe, Vladimir Matijivic, Nebosja Urtajl, Olivur Abrahamsen, Tórður Mortensen - Jón Tórur Holm, Allan Michelsen, Bárður Dimon, Dan Mortensen - Aleksandar Radosavljevic
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Christian Carlsson, Knút V. Vesturtún, Andrzej Pacek, Hallur Jacobsen – Teitur Joensen, Marni Djurhuus, Ronnie Samuelsen, Hans Pauli Samuelsen – Sorin Anghel, Ingi Hansen

B36 – B71 1-0 (0-0):

B71 brendi risamøguleikar

Sandoyingar munnu iðra seg stórliga eftir tapið móti B36 í Havn leygardagin. B71 hevði fleiri risastórar málmøguleikar í seinna hálvleiki, men einki bar til. B36 fekk einasta málið og er nú við í oddastiðnum

2. DEILD
Jákup Mørk

Tað var B71, sum trýsti, men B36 fekk einasta málið, tá teir høvdu alt tað hepnið, sum besta liðnum restaði dagin eftir
Mynd: Álvur Haraldsen

Vónirnar um uppflyting hjá B71 fingu eitt skot fyri bógvin, tá liðið tapti 1-0 móti B36 í Havn. B71 var ein av favorittunum til uppflyting undan kappingarárinum, men liðið hevur longu tapti tríggjar av teimum seks dystunum í landskappingini.

Við sigrinum fór B36 framum B71, og havnarliðið hevur enntá spælt ein dyst færri enn hini liðini.

Tað var B36, sum hevði munin í fyrra hálvleiki, men málmøguleikarnir vóru ikki nógvir í tali. B36 fekk ein gyltan møguleika at leggja seg framum heilt tíðliga í dystinum. Dómarin metti, at ein B71-ari hevði skumpað ein mótstøðumann í brotsteiginum, og hann dømdi brotsspark.

Valdemar Novicki las tó skjúttan av og bjargaði. Bólturin datt tó fyri føturnar á einum B36-ara, sum royndi seg við skoti, men málverjin bjargaði. Í triðju atløgu fekk B36 aftur skot á, men málverjin bjargaði eisini triðja skotinum. Sera gott málmansspæl frá pólverjanum. B71 skapti ikki nógv frameftir vøllinum í fyrra hálvleiki, meðan B36 hevði onkran møguleika.

Lívligt eftir steðgin

Eftir steðgin gjørdist dysturin meira opin, og álopini gjørdust alt meira vandamikil, sum dysturin leið. Sera heitt var í Gundadali henda seinnapartin, men ferðin var tó høg allan hálvleikin.

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki hendi ikki so nógv, men bæði liðini lógu framvið. Tá hálvleikurin var hálvrunnin fekk B36 avgerandi málið. Mortan Johannesen og Ib Mohr Olsen dystast í brotsteiginum um ein bólt, sum heldur tilvildarliga dettur fyri føturnar á Helga Jacobsen, sum júst var innskiftur. Hann langar til fyrstu ferð, og hesuferð fór bólturin framvið tí annars stinna málverjanum.

B71 fekk ein veruligan hvøkk av hesum málinum og sendi nógv fólk fram á vøllin. Tað eydnaðist so sanniliga sandoyingum at skapa nakrar málmøguleikar, men í netið fór bólturin ongantíð, hóast B71 hevði óteljandi málmøguleikar móti endanum.

Einaferð brast bólturin á tvørstongina, og stongin varð eisini rakt, men hepni var ikki við teimum. B71 mundi hava einar fimm møguleikar, sum aðrar dagar høvdu givið mál. Antin bjargaði Magnus Poulsen í málinum, ella raktu teir ikki málið.

Av tí at B71 sendi alt sítt fólk fram, gjørdist meira opið í hinum endanum, men B36-ararnir vóru ikki nóg neyvir og stóðu ofta rangstaddir. B36 fekk einaferð bóltin í netið, men linjuverjin vinkaði fyri rangstøðu.

B36 vóru sera fegnir um sigurin, og liðið er nú við aftur í oddinum, meðan B71 misti eitt fet í stríðnum um uppflyting.

B36 – B71 1-0 (0-0)
1-0: Helgi Jacobsen

Hvidovre hevur bjargað sær

Men tað er framvegis óvist, hvar Óli Johannesen fer at spæla, tá donsku fótbóltsspælararnir fara at koma aftur úr summarfrí

DANMARK
Jóannes Hansen

Nú er tað greitt, at tað verða Farum og Køge, sum fara at loysa Vejle og Lyngby av í superliguni. Fyrsta umferð verður á skránni á ólavsøku.

Tað er eisini greitt, at Hvidovre, sum hevur Óla Johannesen á liðnum, fer at halda fram í næstbestu deildini. Største partin av kappingarárinum hava teir stríðst fyri at sleppa undan niðurflytingini, og nú er tað eydnast teimum. Sjálvt um teir sunnudagin taptu 3–1 ímóti Brønshøj, sum hevur kent niðurflytingar eldin brenna undir sær.

Úrslitið á Tingbjerg stadion, sum er heimavøllurin hjá Brønshøj, var sera óvæntað. Men ofta vísir tað seg soleiðis, at lið, sum rættuliga kenna seg hava ryggin ímóti múrinum, megna tað, sum eingin hevði roknað við – og tað av eyðsýndum orsøkum.

Eitt annað dømi um júst hetta var dysturin í Farum sunnudagin. Heimaliðið, sum hóast stóran turbolens kring felagið og í kommununi sum heild, langt síðani hevur tryggjað sær pláss í bestu deildini komandi kappingarár, hevði vitjan av B93, sum hevur havt afturpartin í vatnskorpuni alt kappingarárið. Hesa ferð megnaði B93 tað, sum yvirhøvur eingin hevði roknað við. Úrslitið var 1–0 til gestirnar av Eysturbrúgv, og tað hevur við sær, at B93 ivaleyst sleppur at halda fram í næstbestu deildini.

Preben Elkjær er millum teirra, sum hava sett pengar í B93. Hann er tætt uppat Flemming Østergaard, sum er høvuðsmaðurin í FCK. B93 skal ivaleyst vera klekingarstøð fyri møguligar spælarar til FCK. Tað hevði verið óheppið, um flaggskipið í felagnum hevði dottið niður í triðju deildina, men nú verður tað helst av ongum.

Komandi sunnudag skal B93 spæla ímóti Brønshøj. Um dysturin endar við javnleiki, so sleppa bæði liðini heilt víst undan niðurflyting. Tað kundi boða frá málleysum javnleiki!

Herfølge hevur rættuliga havt undanvind síðstu nógvu umførini. Hesa ferð høvdu teir vitjan av langt síðani niðurflutta Skive, sum varð sent til hús við 8–0 tapi í viðførinum.

Hitt liðið í Køge kommunu, Køge Boldklub, vann 2–0 í Sønderborg ímóti HFK Sønderjylland, sum hevði ætlað sær annað uppflytingarplássið, men nú verður tað av ongum, tí Køge flytir upp.

Fredericia og Johan B. Hansen høvdu vitjan av grannunum úr Odense. B1913 fór um aftur brúnna um Lítlabelt við einum stigi. Úrslitið var 3–3, og harvið er púra greitt, at Fredericia ikki flytir niður.

Randers Freja vann heimadystin ímóti grannunum úr Horsens við 2–1. Húsagangurin verður av ongum, og Randers Freja fer at halda fram í næstbestu deildini.

FC Aarhus hevur fingið fyrrverandi stórspælaran Flemming Povlsen sum oddamann, hevur stórar ætlanir. Teir hava bjóðað Manchester United at spæla í Aarhus í august, og tað gongst teimum væl í næstbestu deildini. Um teir fara at megna at koppa AGF – barndómsfelagið hjá Flemming Povlsen av fótbóltstrúnuni í Árhus – er kortini ein annar spurningur.

Sunnudagin hevði FC Aarhus vitjan av Kolding, sum er á veg úr næstbestu deildini. Úrslitið var 2–0 til heimaliðið.

Í Noregi hótta teir við at fara í verkfall

Molde er framvegis í toppinum, og Jákup Mikkelsen bíðar framvegis á beinkinum eftir at fáa møguleikan

NOREG
Jóannes Hansen

Meðan fótbóltsfóðrið á sjónvarpsskíggjanum kanska er meiri enn gott er, verður tað spælt av lívsins kreftum í føroysku landskappingini, og tað sama er galdandi í Íslandi og Noregi. Undanfarin ár hava vit gjørt burturúr íslendsku kappingini, men nú eru eingir føroyingar har yviri. Tí er føroyski áhugin ikki tann, sum hann hevur verið undanfarin ár.

Í Noregi er umboðanin eisini nógv minni, enn hon hevur verið. Jákup Mikkelsen er einasti føroyingurin í norskum fótbólti, og hann spælir lítið og einki á besta liðnum. Eddie Gustafsson, sum ivaleyst heldur hevði viljað verið við Svoríki í HM endaspælinum, er sannførandi millum stólparnar hjá Molde, og tað er harmuligt hjá Jákupi Mikkelsen, sum fyri tveimum árum síðani, tá Herfølge vann danska meistaraskapin, væl og virðiliga vísti, hvør dugur er í honum.

Verkfall

Í Noregi verður annars nógv tosað um, at fótbóltsspælararnir hótta við at fara í verkfall. Teir halda stutt sagt, at umstøðurnar hjá fótbóltsspælarunum eru ikki nóg góðar. Hvøki tá tað snýr seg um løn, ella tá tað snýr seg um arbeiðsumstøðurnar.

Semingsmaður er komin uppí samráðingarnar millum spælarafelagið og arbeiðsgevararnar. Fundur verður mikudagin í komandi viku. Um tað ikki eydnast at finna eina semju, so verður verkfall 23. juni.

Tað eru kortini ikki allir spælararnir, sum eru á veg í verkfall. 251 av spælarunum í bestu og næstbestu deildunum eru skrásettir hjá spælarafelagnum. Tað verður mett at eina staðni millum hálvt annað hundrað og tvey hundrað spælarar ikki eru limir. Millum hesar eru spælararnir í Rosenborg. Teir ásanna, at teirra umstøður eru so mikið góðar, at teir ikki kunnu fara í verkfall. Har er altso eingin solidaritetur.

Molde í toppinum

Sunnudagin var Molde á útivølli ímóti Bodø/Glimt, og tað gekk sum eftir ánni. Eddie Gustafsson helt tætt, og síðstu minuttirnar skoraðu liðfelagarnir tvey mál. Molde kom á odda, tá tað restaðu ellivu minuttir. Lítla løtu seinni misnýttu teir brotssparkk, men tá tað restaðu tríggir minuttir øktu teir og staðfestu harvið 2–0 sigurin.

Molde er næstfremst. Ovast í tippuliguni er Lyn, sum hesa ferð bara megnaði 1–1 í lokaupp gerðini í Bergen ímóti Brann.

Rosenborg og Lillestrøm hava saman við Molde verið roknað sum bestu boðini upp á NM. Men tað hevur ikki gingið so væl hjá avbjóðarunum, sum tað hevur gjørt hjá Molde.

Leygarkvøldið var Lillestrøm á útivølli ímóti Sogndal, og tað gekk sera væl hjá fyrrverandi føroyska felagnum. Sogndal vann 5–2.

Rosenborg var sunnudagin á útivølli ímóti Stabæk, og tað gekk ikki meiri enn passaligt hjá teimum úr Tróndheimi, tí úrslitið var málleysur javnleikur.

Odd Grenland er triðja liðið, sum er í toppinum saman við Molde og Lyn. Hesa ferð høvdu teir í Skien vitjan av Viking úr Stavanger, og heimaliðið vann 2–0.

Danska 1. deild

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Køge	29	21	-	3	-	5	59	30	29	66
2	Farum	29	19	-	6	-	4	62	33	29	63
3	HFK Sønderj.	29	17	-	3	-	9	59	48	11	54
4	Herfølge	29	15	-	8	-	6	58	35	23	53
5	Frem	29	14	-	9	-	6	53	37	16	51
6	Randers F.	29	14	-	6	-	9	59	37	22	48
7	B 1913	29	11	-	10	-	8	42	42	0	43
8	AC Horsens	29	11	-	8	-	10	38	31	7	41
9	FC Aarhus	29	11	-	8	-	10	39	39	0	41
10	Hvidovre	29	8	-	8	-	13	42	49	-7	32
11	Fredericia	29	7	-	9	-	13	43	43	0	30
12	B 1909	29	8	-	5	-	16	46	66	-20	29
13	Brønshøj	29	7	-	6	-	16	41	62	-21	27
14	B93	29	7	-	6	-	16	36	58	-22	27
15	Kolding FC	29	6	-	6	-	17	42	63	-21	24
16	Skive	29	3	-	5	-	21	34	80	-46	14

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers F.), Óli Johannesen (Hvidovre),Johan Byrial Hansen (Fredericia)

Norska tippeligan

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Lyn	11	8	-	1	-	2	17	14	3	25
2	Molde	11	7	-	2	-	2	22	8	14	23
3	Odd. Grenl.	11	7	-	1	-	3	19	11	8	22
4	Stabæk	11	5	-	4	-	2	19	12	7	19
5	Rosenborg (M)	11	5	-	3	-	3	20	13	7	18
6	Viking	11	5	-	3	-	3	20	14	6	18
7	Bodø/Glimt	11	4	-	2	-	5	16	14	2	14
8	Váleranga	10	3	-	4	-	3	12	10	2	13
9	Lillestrøm	11	3	-	4	-	4	11	13	-2	13
10	Bryne	11	3	-	2	-	6	12	19	-7	11
11	Brann	11	3	-	2	-	6	14	22	-8	11
12	Sogndal	11	2	-	2	-	7	15	25	-10	8
13	Start	11	1	-	4	-	6	9	20	-11	7
14	Moss	10	1	-	4	-	5	9	20	-11	7

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)